

# Oljuprísurin lækkar aftaná nei í Grikkalandi

**Jógvan Hugo Gardar**

06.07.2015 - 06:44

Oljan.fo

Norðsjóvaroljan Brent er lækkað við meir enn 3,60 prosentum síðani fríggjadagin. Klokkan seks í morgun var prísurin 59,51 dollarar fyri fatið.

Seinast Brent-oljan kostaði minni enn 60 dollarar fyri fatið var tann 10. apríl, tá hon bleiv seld fyri 57,89 dollarar.

Greinarar meta at orsøkin til lækkingina er støðan í Grikkalandi, samstundis sum spenningur er um tað eydnast USA og Iran at koma fram til eina semju um eina kjarnorkuavtalu. Um londini semjast, so kann tað merkja at tað gerst lættari hjá Iran at selja olju á heimsmarknaðinum, og tað kemur at trýsta prísin niður. Samráðingarnar halda fram í hesi vikuni.